í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Hilton og Richie hjálpa tjúkkum børnum




Mynd: Polfoto

Paris Hilton og Nicole Richie hava í sendirøðini The Simple Life ferðast kring USA og gjørt seg sjálvar til grin. Burtur úr hesum er komið sjónvarpsundirhald, sum er selt til nógv lond og eisini hevur verið at sæð á okkara leiðum.

Nú er eitt nýtt umfar av The Simple Life á veg, og nú skulu tær báðar yvirklassagenturnar hjálpa børnum, sum viga ov nógv.

Tær báðar skulu verða leiðarar fyri einari legu, har tjúkk børn koma fyri at klænka seg. Kanska eitt sindur undranarvert, tá ið hugsað verður um, at Nicole Richie hevur viðgingið, at hon hevur etingarólag.

# Bean Laden



Mynd: Polfoto

Tað er upp á tíðina, at onkur ger gjøldur burtur úr Bin Laden. Tað heldur í øllum førum enski skemtarin Rowan Atkinson, sum er kendur í leiklutinum sum Mr. Bean.

- Tað er avgjørt nakað stuttligt við Bin Laden. Tí hvar fjalir hann seg, hvat fær hann til morgunmat og hvat tekst hann við, spyr Rowan Atkinson við The Sun.

Hann heldur, at tað ber saktans til at gera gjøldur burtur úr Bin Laden uttan at flenna at hansara átrúnaðarligu sannføring.

# Svimja í takt



Mynd: Polfoto

Tað ræður um at hava tunguna mitt í munninum og venda beinini rættan veg, tá ið synkron-svimjing er á skránni. Á myndini er tað kanadiska landsliðið í synkron-svimjing, sum hevur sína innleiðandi framførslu undir HM í svimjing, sum í hesum døgum verður hildið í Melbourne í Australia. Føroyskir svimjarar eru eisini farnir til kappingina, men teir skulu svimja hvør sær – og so skjótt sum gjørligt.

# Hvør bankar upp á hurðina?



Ein palestinsk kvinna letur hurðina upp, tá ið tað bankar upp á. Kanska er hon ikki heilt óvand við slíka sjón, sum møtir henni uttanfyri hurðina. Tað eru ísraelskir hermenn, sum leita eftir ungum palestinskum monnum eftir ófrið í Ramallah.

Mynd: Polfoto

# Kristofferson fær góð ummæli

Amerikanska country-legendan Kris Kristofferssson kemur um eina góða viku til Føroya at hava konsert. Konsertin í Føroyum er ein partur av eini ferð í Norðurlondum. Kristoffersson hevur longu havt fleiri konsertir í Norðurlondum, og ummælini hava verið stak góð.

Ekstrablaðið helt í sínum ummæli, at talan var um eina rætta legendu, sum kundi fangað áhoyrararnar einsamallur við sínum gittara. Tað var sum at uppliva ein kovboyara, sum var á veg ímóti sólsetur.

Gaffa letur eisini væl at konsertini, sum varð hildin í Tivoli, og skriva millum annað:

– Fólk fingu tað, sum tey komu eftir – ein mann maður og hansara gittara. Ein maður, sum vil geva tað aftur, sum hann hevur fingið – erligt og takksamt.

Konsertin við Kris Kristoffersson verður í ítróttarhøllini á Hálsi tann 3. apríl.



(Mynd: Kris Kristoffersson)

Sosialurin